# Einki álit á Fiskasøluni

**Nevndin fyri Framtaksgrunnin trýr ikki uppá, at Fiskasølan klárar seg einsamøll. Har manglar burðardygt grundarlag. Tí varð neyðugt at leggja saman við Fiskavirking, sigur nevndarformaðurin fyri Framtaksgrunnin**



*Nevndin fyri Framtaksgrunni hevur ikki álit á, at Fiskasølan klárar at standa á egnum beinum, eftir at fyritøkan í fleiri ár ikki hevur havt burðardygt grundarlag at byggja á og seinastu tvey árini hevur havt hall*

FISKASØLA
*Edvard Joensen*

Nevndin fyri Framtaksgrunnin hevur ikki álit á, at Føroya Fiskasøla klárar at standa á egnum beinum. Tí eg fyritøkan løgd saman við Føroya Fiskavirking, sum Framtaksgrunnurin eisini eigur. Fiskasølan hev ur seinnu árini ikki havt burðardygt grundarlag at bygt á, og tað hevur seinastu tvey árini gjørt, at Fiskasølan hevur havt hall. Tað eru avleiðingarnar av hesum, sum nevndin fyri Framtaksgrunnin nú tekur.

Tað hevur elvt til ikki heilt sørt av politiskum roki, at nevndin fyri Framtaksgrunnin soleiðis »over night« kappaði høvdið av Fiskasøluni, sum onkur hevur málborið seg. Og so góðum líkt eru tað kanska serliga politikarar úr ávísum valdømum og teir við ávísari politiskari ideologi, sum ganga undan í hesum víggi.

Men tað tekur nevndin fyri Framtaksgrunnin heilt róligt, sigur nevndarformaðurin, Dagmar Joensen.

– Vit eru sett í hetta starvið - hava fingið áheit um at taka tað á okkum - til at umsita teir almennu pengarnar, sum Framtaksgrunnurin hevur til taks. Og tað gera vit so, eftir sum vit halda vera best. Um vit hava politiskan uppbakning ella ikki, kemur sum so ikki málinum við. Eru politikararnir ikki nøgdir við okkara arbeiði, stendur teimum púra frítt at velja onkran annan næstu ferð nevnd skal veljast. Nevndin hevur ongar ætlanir um at leggja frá sær av hesum, sigur hon.

## Onga viðmerking

Dagmar Joensen, nevndarformaður í Framtaksgrunninum, er ikki serliga tíðindafró soleiðis yvirhøvur, tá spurt verður um hetta við kapping millum tvær fyri tøkur hjá Framtaksgrunninum og um, hví ikki selt verður, tá tað beinleiðis stendur í viðtøkunum fyri Grunnin, at seljast skal, tá nøktandi boð eru.

Tó skilst á nevndarformaninnum, at nevndin ikki hevur hildið boðini, sum komin eru, hava verið nøktandi. Og hatta við, at tað stendur í viðtøkunum, at seljast skal, er bara eitt brot úr viðtøkunum, vísir hon á. Viðtøkurnar skulu, eins og aðrir tekstir, lesast í síni heild og ikki pettast sundur og brúkast, sum ein sjálvur heldur vera passandi.

– Tað stendur eisini í viðtøkunum, at nevndin skal umsita virðini hjá Grunninum á bestan hátt, og alt í alt hevur nevndin so ikki hildið, at ein søla ella tvær beint nú høvdu verið tað, sum hevði tryggjað virðini mest, sigur Dagmar Joensen.

Hon vísir á, at við eini samanlegging av Fiskavirking og Fiskasøluni, kann kapitalur hjá fyritøkunum verða givin leysur, og tað fer at lætta um.

## Vísir søgum aftur

Tað er avgjørt ikki undir trýsti frá Føroya Fiskavirking, at hetta, sum nú hendir, verður gjørt, sigur Dagmar Joensen. Hon vísir staðiliga aftur, at tað er leiðslan í Fiskavirking, sum kennir seg hótta av Fiskasøluni, tí Fiskasølan sjálv hevur flakavirki, sum arbeiða í kapping við Fiskavirking.

Tað hevur heldur einki at gera við, at tað ljóðar, at Føroya Fiskavirking flýtur tungt, sigur Dagmar Joensen. Og so vil hon heldur ikki gera fleiri viðmerkingar til tað.

Eftir stendur so, at nevndin fyri Framtaksgrunnin hevur ikki mett, at teir keyparar, sum hvør í sínum lagi hava boðið upp á Føroya Fiskasølu og Føroya Fiskavirking, hava verið nóg áhugaverdir til at tosa um sølu við.

Men hvønn Dagmar Joensen og restin av nevndini fyri Framtaksgrunnin so metir vera nóg áhugaverdan til at keypa »allan klumpin« í einum, vil nevndarformaðurin ikki siga nakað um.

---

# Yvir 90 suðuroyingar í vanda fyri at missa arbeiðið

**Tað ljóðar at ongin fiskur verður keyptur til virkið í Hvalba og í Vági. Tilsamans arbeiddu yvir 90 fólk á hesum báðum virkjunum**

FISKAARBEIÐI
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Tað er stórur vandi fyri arbeiðsplásunum hjá yvir 90 suðuroyingum.

Tað hendir eftir at Fiskavirking hevur yvirtikið Fiskasøluna. Fiskasølan hevur flakavirkið í Hvalba og saltfiskavirkið í Vági og har hava tilsamans yvir 90 fólk havt heilt fitt av arbeiði seinastu dagarnar.

Men vælvitandi keldur vilja vera við, at eitt tað fyrsta, sum Fiskavirking gjørdi, var at halda uppat at keypa fisk til fiskavirkini í Vági og í Hvalba.

Í hvussu so er, kann staðfestast, at ongin fiskur er á virkinum í Hvalba og í Vági eru tey liðug í dag við tað, tey hava av fiski og har fyriliggur onki um at tey fáa meiri fisk.

Tað hevur ikki borið til at fingið fatur á nøkrum á Fiskavirking, men vælvitandi keldur í nánd av Fiskavirking vátta, at ongin fiskur verður keyptur til hesi bæði virkini meir, og hetta fer í hvussu so er at standa við fyribils.

Hesi leysatíðindi verða styrkt av tíðindum á heimasíðuni hjá Suðurrás, har keldur á saltfiskavirkinum í Vági upplýsa, at ongin fiskur verður keyptur meir til virkið í hvussu so er fyribils.

Men hvussu verður í longdini er óvist.

Suðuroyggin er tað økið í landinum, sum er harðast rakt av arbeiðsloysi, men nú er so arbeiðið hjá yvir 90 suðuroyingum afturat í stórum vanda. Eini 45-50 fólk hava arbeitt á virkinum í Vági og nakað tað sama í Hvalba.

Fiskavirking hevur ov mikið av virkjum norðanfjørðs til at arbeiða fisk á, ikki minst saltfiskavirkið á Toftum og tað er tískil lítið sannlíkt, at teir fara at varðveita virkini í Suðuroy.

Hinvegin er laksavirkið í Fuglafirði, sum fiskasølan eisini átti, í frægari støðu, tí har hava tey sáttmálar um levering í næstan eitt ár afturat.